# Almannastovan Stuðulsfólk

**Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Almannastovuna, við regluligum fundum í mun til arbeiðið.**

Arbeiðið fevnir m.a. um:
• Fylgjarauppgávur
• Stimbran
• Familjuráðgeving
• Umlætting

**Størvini eru hesi:**

## Í Eysturoy

**1)** – at stuðla og hjálpa einum 6 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur børn, stimbra honum við venjingum og spæli, einsmøllum og saman við øðrum. Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Barnagarði og í heiminum.

Tímatalið er 40 tímar um vikuna fyribils til 15.07.2003.

Tað er eisini møguleiki hjá tveimum fólkum at arbeiða 20 tímar um vikuna í part.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður hevur koyrikort.

**2)** – at stuðla og menna einari 16 ára gamlari gentu. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni og er tímatalið 20 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 30.06.03

## Í Norðoyggjum

3) – at stuðla einum manni í gerandisligum uppgávum og hjálpa honum at skipa dagin. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hækka tímatali.
Játtanin er fyribils til 01.12.02

## Í Tórshavn

4) – at hjálpa einum ungum manni við at skipa dagin og stuðla honum í gerandisligum uppgávum. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hækka tímatali. Játtanin er fyribils til 01.12.02.

5) – søkt verður eftir avloysara fyri stuðul í barnsburðarfarloyvi.
Til 5 ára gamla rørðslubrekaða gentu. Arbeiði hjá stuðlinum er í heiminum hjá barninum, í neyvum samstarvið við familjuna og aðrar stuðlar. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og er skiftandi seinnapartar, nátt og eitt samdøgur annan hvønn mánaða.
Játtanin er fyribils til 31.08.02

**6)** – at stuðla og menna eini 8 ára gamlari gentu við spæli og venjingum og fara við henni til ymisk tiltøk Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni. Tímatalið er 20 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 31.08.02

**7)** – søkt verður eftir pleygufamilju til unga mammu við einum barni. Arbeiðið fevnir um at virka fyri einum tryggum og mennandi umhvørvi, eins og stuðla mammuni og barninum.
Játtanin er fyribils 1 ár.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Sigrun Bærentsen, Ragnhild Dahl og Karin á Heygum á tlf. 315480 í tíðini kl. 09.00-13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skula verða

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

**í hendi í seinasta lagi 22.05.02**

Í umsókníni skal vera tilskilað uppgávu nummar.

Sosialurin
Sosialurin i

# Útbjóðing

Vegna Tórshavnar havn verður arbeiðið at gera eitt atløgupláss til nýggju Norrønu á Bursatanga boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið umfatar í stórum:
- 90m langa bryggjusíðu úr stálspunsi
- Uppfylling við uml. 15.000 $m^3$ av gróttilfari
- Alla vanliga bryggjuútgerð so sum pullartar og fendarar v. m.
- Dimensionering og detailprojektering av lyftibilbrúgv úr stáli við allari útgerð, so sum hydraulikki og elektroniskari stýring v.m.
- Veiting og uppseting av bilbrúnni við tilhoyri.

Fyrireikingar skulu gerast í góðari tíð, men farast kann ikki undir arbeiðið í sjálvari havnini fyrr enn 06. september 2002, tá summarsiglingin hjá Norrønu heldur uppat. Ferjulegan skal takast í nýtslu 17. febr. 2003.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá Landsbyggifelagnum, har tað verður útflýggjað móti eini kvittan um, at kr. 5.000,- eru settar á konto hjá Tórshavnar havn nr. 1544111 í Føroya Banka.

Tilboð í afturlætnum brævbjálva merktur »Atløga til Norrønu« skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinsta lagi 03. juni 2002 kl. 14.00.

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 03. juni kl. 14.00.

**Landsbyggifelagið P/F,**
**Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228
110 Tórshavn

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- *Verndarhjálmar og húgvur*
- *Hoyrivernd v/FM radio*
- *Brillur*
- *Maskur*
- *Trygdarskógvar*
- *Fallsikringar*
- *Handskar*
- *Hondreins*
- *Vit útvega skiltir til **øll** endamál!*

*Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd*

Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla o umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1346, Sp/f Kneysur, 750 Viðareiði.

Viðtøkur broyttar: 10.03.2002.
Nýtt navn: P/F Kneysur
Kapitalur:
Hækking við kr. 781.000,00 til kr. 861.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 781.000,00 við grunshækking.

Skráseting Føroya tann 3. mai 2002

Kristin Balle

Í Býin
- hvønn hósdag

FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat ella Kára á Rógvi, adv. fulltrúa um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3351
Navn: P/F ERO
Adressa: c/o Rúni Berg, Rúnarvegur, 620 Runavík
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 05.01.2002
Viðtøkudato: 05.01.2002
Kapitalur: Kr. 800.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 800.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: P/F Teymavirkið, 620 Runavík (P/F 570) og Esther Berg, Mýravegur, 620 Runavík.
Nevnd: Esther Berg, Mýravegur, 620 Runavík (formaður), Rúni Berg, Rúnarvegur, 620 Runavík og Jónfinn Thomsen, á Fjósteig, 360 Sandavágur.
Stjórn: Rúni Berg, Rúnarvegur, 620 Runavík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av formanninum ella stjóranum.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 05.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, ídnað, útleigan o.a. virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 3. mai 2002

Kristin Balle



## *TAKK FYRI ÁLITIÐ*



*Stóra takk fyri stuðulin tit góvu Sambandsflokkinum til løgtingsvalið*

*Serliga takki eg tykkum, ið vístu mær so dyggan stuðul*

*Blíðar heilsanir*

***BÁRÐUR NIELSEN***



## *Tøkk*

***Ein hjartans tøkk til øll tykkum í Kollafirði, Kvívík og Haldórsvík, sum góðu mær og Fólkaflokkinum so dyggan stuðul til løgtingsvalið.***

***William av Vollanum***

# Saron Vestmanna

**Møtir í Vestmanna við Orla Lindenskov Christensen**



Tað er bert Guds kærleiki einsamallur, sum førur við sær, at menniskju verða hjálpt í neyð teirra.

Tað, sum Jesus praktiseraði við at hjálpa, gera væl og grøða sjúk – tað er ikki bert søga, men virkar í dag í kirkjum og samkomum, sigur Orla Lindenskov

**9/5 Kristi himmalsferðardagur**
kl. 11.00 Morgunmøti
kl. 18.00 Veking og grøðingarmøti

**12/5 Sunnudagin**
kl. 11.00 Morgunmøti, har eisini verður biðið fyri sjúkum.

Møtini eru almenn og øll eru hjartaliga vælkomin.

Tíðindi Viðmerkingar Íróttur Nøvn Skráir Tí tøk Sosialurin

# Starvsfólk til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir 10 starvsfólkum til nýggju Familjudeildina á Føroya Barnaheimi, sum væntandi letur upp tann 1. august 2002 – 9 teirra fulltíðarstørv og eitt hálvtíðarstarv.

Haraftrat verður søkt eftir einum starvsfólki at arbeiða fulla tíð á Ungdomsdeildini á Barnaheiminum.

Familjudeildin verður deild, har familjur kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Staðið er ætlað familjum, har foreldur av ymiskum orsøkum illa megna at røkja uppgávuna sum foreldur, og har mistrivnaður er í familjuni.

Endamálið við uppihaldinum er at fáa greiði á, hvørja styrki og hvørjir trupulleikar, familjan hevur, og hvussu hon best kann stuðlast framyvir. Somuleiðis er endamálið, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, og at familjan sum heild verður hjálpt at koma í betri menning.

Uppgávurnar á Familjudeildini fevna m.a. um:
1) At eygleiða og lýsa foreldraførleikar og meta um menningarmøguleikar hjá foreldrum og samstundis eygleiða og lýsa, hvussu børnini eru fyri.

2) Familjuviðgerð, har dentur verður lagdur á, at hvør einstakur í familjuni fær møguleika at menna seg og koma at trívast betur, og at familjan sum heild kemur at virka betur.

Væntandi verður eisini ein nýggj Smábarnadeild latin upp á Barnaheiminum í næstum. Deildin skal taka ímóti børnum í aldursbólkinum 0-12 ár. Umframt taka ímóti børnum, sum hava bráðfeingis tørv á einum uppihaldsstað, er deildin ætlað til stytri eygleiðingaruppgávur. Endamálið við hesum er fyrst og fremst at geva barnaverndini, ið innskrivar barnið á Barnaheimið, betri møguleikar at meta um menning barnsins og møguligan tørv á framhaldandi hjálpartiltøkum.

Um hendan deildin verður latin upp, verða trý av omanfyrinevndu starvsfólkum flutt til hesa deildina. Nærri kann tosast um hetta í eini møguligari samtalu við umsøkjararnar.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir einum sálarfrøðingi at starvast hálva tíð, familjuterapeutum, pedagogum o.ø., ið hava relevanta útbúgving ella royndir til at taka sær av børnum og foreldrum í kreppu.

**Lønar og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Miriam Johannesen, settur leiðari á Barnaheiminum.

Umsóknarfreistin er tann 3. juni 2002 kl. 14.00.
Umsókn við avritum av skjalprógvum skal sendast til:

**Stýrið fyri Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# Leiðari til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. juli 2002 ella skjótast tilber.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Á Barnaheiminum er í løtuni ein Ungdómsdeild við 6-7 børnum. 7 starvsfólk eru á deildini. Á Barnaheiminum er harafturat skrivstovuhjálp og húsavørður hálva tíð. Verandi leiðari er fyribilssettur.

Frá 1. august í ár verður sett á stovn Familjudeild, har foreldur og børn kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Væntandi kunnu upp til 4 familjur vera á deildini í senn. Í lýsing í blaðnum í dag verður søkt eftir 10 starvsfólkum til deildina.

Ætlandi verður eisini ein Smábarnadeild latin upp í næstum at taka ímóti børnum frá 0-12 ár.

Føroya Barnaheim er ein stovnur, sum við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamálið at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum/familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Tíðandi partur av starvinum sum leiðari er samstarv við avvarðandi, barnaverndir, myndugleikar, skúla, ansingarstovnar, heilsuverk umframt fakfólk og onnur, ið varða av barninum/familjuni.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðaraevni, hevur áræði og dugir at ganga nýggjar leiðir, dugir at samstarva við ymisku fakbólkarnar og at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri tey, sum búgva á heiminum, og starvsfólkini.

Til starvið krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi við eftirútbúgving innan leiðslu og familjuterapi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson á telefon 319727 eftir kl. 17.00.

Skrivlig umsókn við prógv, viðmælum, v. m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 27. mai 2002.

**Stýrið fyri Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

# P/f Bakkafrost á Glyvrum

Vit søknast eftir arbeiðsfólki at arbeiða í vaktum beinanveg.

Talan er um støðugt arbeiði.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**P/F Bakkafrost tlf. 447485**